# Roknidømi: Full útleiga

Í døminum galda hesi viðurskifti:

- Samlað fermetratal: 200. Útleigað fermetratal: 200.
- Útleiguár: 3. Útleigudagar um árið: 365.
- Árlig leiguinntøka: 144.000. Skattaprosent: 40.

Rakstrarútreiðslur: (Leypandi útreiðslur at halda leigumáli koyrandi, 100% kunnu dragast frá)

- Árlig orkunýtsla, el og olja til øll húsini: ........................................................ 10.000 kr.
- Árligt tryggingargjald fyri øll húsini: ............................................................ 3.500 kr.
- Rentur av húsaláni: ..................................................................................... 20.000 kr.

Rakstrarútreiðslur at draga frá: ........................................................................ 33.500 kr.

Viðlíkahaldsútreiðslur: (Útreiðslur sum standast av sliti í sambandi við útleigu)

- Máling: Áramál, 8 ár (10.000 x 3/8)* ........................................................... 3.750 kr.
- Kaffimaskina: Áramál, 3 ár (1.200 x 3/3)* ...................................................... 1.200 kr.

Viðlíkahaldsútreiðslur at draga frá: ................................................................... 4.950 kr.

*) 8 ár skulu ganga, áðrenn máling kann dragast fult frá. Verður málað eftir 3 árum, kunnu 3/8 av útreiðslunum dragast frá. 3 ár skulu ganga, áðrenn kaffimaskinan kann dragast fult frá. Sí áramál fyri aðrar útreiðslur í Áramál fyri, nær viðlíkahaldsútreiðslur í sambandi við húsaleigu kunnu dragast frá.

Stovningarútreiðslur: (Útreiðslur til at stovna leigumál)

Útreiðslur til leysafæ kunnu dragast frá eftir einum ári. Útreiðslur til fastafæ kunnu ikki dragast frá.

- Seingjarklæði .............................................................................................. 400 kr.
- Tallerkar..................................................................................................... 300 kr.
- Handklæði................................................................................................... 500 kr.

Stovningarútreiðslur at draga frá: ..................................................................... 1.200 kr.

Árlig leiguinntøka eftir skatt og frádrátt:

Skattskyldig inntøka: (144.000 - (33.500 + 4.950 + 1.200)) ................................................ 104.350 kr.

Skattur, við skattaprosenti á 40: (104.350 x 0,4) .......................................................... 41.740 kr.

**Úrslit: ...................................................................................................... 62.610 kr.**